# Svínoy aftur ein hálvan tím



*Svínoyar bygd*

**Tingmenn vóru títtir á palli mikudagin, og teir flestu søgdu seg hava góðan vilja, tá ið Løgtingið enn eina ferð umrøddi, hvørjir møguleikar eru at venda gongdini í alla stadda útjaðaranum, sum lítil vón tykist vera fyri, um ikki farið verður undir munandi tiltøk**

## SVÍNOY OG FRAMTÍÐIN

*Jóannes Hansen*

Nú er tað so at siga in, at Svínoyggin verður munnliga endavend, og at Svínoy og harvið útjaðarin eru miðdepil í almenna orðaskiftinum og í miðlunum. Talan tykist vera um gott undirhald og stóra undirtøku, og hjá teimum, sum varða av útjaðaranum, finst ivaleyst einki størri ynski, enn at umrøðan skal bera við sær, at fokus verður sett á trupulleikarnar og ikki minst á, hvussu - og ikki á um - teir kunnu loysast. Tað er í tøkum tíma, tí útjaðarin bløðir sum ongantíð fyrr, og tað er neyvan skeivt at spyrja, um tað man vera komið so langt, at eingin vón er fyri onkrar av oyggjunum. Tað sær rættuliga svart út.

Tað eru bara nakrar fáar vikur síðani, at mjólkarkvotan, sum sigst vera á veg úr Svínoy og í Eysuroy, varð viðgjørd í Løgtinginum. Ta ferðina vóru nógvir á pallinum, og útjaðaraspurningurin í síni heild varð umrøddur. Almenni mjólkastuðulin hevur í hvussu so er partvís verið útjaðarastuðul. Nú er langt millum mjólkineytini í útjaðaranum, og harvið verður nógv størsti parturin av mjólkastuðlinum rindaður í miðstaðarøkinum.

Sunnukvøldið var fín sending í SvF um Svínoy, har eitt nú strandferðslumaðurin Regin Justinussen, Hanna Jacobsen, sum hevur postin, og borgarstjórin og fyrrverandi og vónandi framtíðar alarin lýstu støðuna. Hetta var ein av teimum sendingunum, sum tænir Sjónvarpi Føroya til miklan sóma, og hetta var sending, sum vísti, at útoyggjarnar eru gott miðlatilfar. Steintór Rasmussen og Studio Pegasus høvdu nakað herfyri leygarkvølds sendingar, har evnið var upplivingar og prát á ferð við Másanum til Fugloyar og aftur í Hvannasund. Tað var áhugavert og upplýsandi, og tað hevur tað eisini verið, tá ið teir í Pegasus hava vitjað í Kalsoynni. Akkurát sum allar hinar sendingarnar, ið óføru klaksvíkingarnir borðreiða við.

Tað var Tórbjørn Jacobsen, tingmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum í Eysturoy, sum spurdi um mjólkarkvotuna í Svínoy. Í Sjónvarpinum sunnukvøldið gav borgarstjórin í Svínoy, Eyðun Jacobsen, til kennar, at tað hevur stóran týdning fyri tey, sum búgva í Svínoy og ivaleyst á hinum smáplássunum, at tað eru signal, sum siga, at tað er áhugi fyri smáu samfeløgunum. Tað varð nevnt, at teir har úti kanska høvdu fingið eitt sindur av nýggjum móti um, at okkurt fór at spyrjast burturúr frá almennari síðu, tí nú høvdu eisini tingmenn aðra staðni frá enn úr Norðoya valdømi sýnt bygdini og grundarlagnum undir henni áhugað.

Mikudagin var tað Karsten Hansen, tingmaðurin hjá Tjóðveldinum í Norðoyggjum, sum í munnligum fyrispurningi fregnaðist eftir, hvat var hent í útjaðaramálinum og viðvíkjandi samferðsluni til Svínoyar, síðani hann saman við Jógvani við Keldu, landsstýrismanni í útjaðaramálum, vitjaði í Svínoy síðsta summar.

Tjóðveldismaðurin legði afturat, tá ið hann setti fyrispurningin fram, at hann og hinir tingmenninir í Norðoyggjum vóru bjóðaðir at vera við í ferðalagnum hjá landsstýrismanninum, men at tað bara var hann, sum møtti í Hvannasundi henda morgunin. Samgongutingmenninar sást einki til, hóast Másin bíðaði fitta løtu, men landsstýrismaðurin og fulltrúðarnir og tjóðveldistingmaðurin høvdu havt ein góðan og kunningarríkan dag í Svínoy, har blíðsskapurin sum altíð var stórur, visti tjóðveldismaðurin at siga. Og løtu seinni nýtti Annita á Fríðriksmørk eitt sindur av sínum minutti at takka partamanninum fyri, at hann hevði verið í Svínoy, hóast hinir tingmenninir í Norðoyum ikki høvdu verið tað!

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum, svaraði. Tingskipanin avmarkar talutíðina hjá hvørjum einstøkum tingmanni rættuliga nógv, tá ið talan er um munnligar fyrispurningar. Fokus var kortini á oynni og útjaðaranum í ein lítlan hálvan tíma. So nógv høvdu tingmenn upp á hjartað um útjaðaran og serliga Svínoynna, og so fæst at síggja, um nakað fer at spyrjast burturúr, tá ið allir flokkar og flestu tingmenn tykjast sinnaðir at nýta hugflog og